## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 7 | 7 - 0 - 0 | 497 | 398 | 99 | 23 |
| 2 VÍF | 7 | 5 - 1 - 1 | 441 | 365 | 76 | 19 |
| 3 Stjørnan | 7 | 2 - 1 - 4 | 408 | 403 | 5 | 13 |
| 4 Kyndil | 7 | 3 - 1 - 3 | 460 | 465 | -5 | 13 |
| 5 StÍF | 6 | 2 - 1 - 3 | 419 | 444 | -25 | 11 |
| 6 Neistin | 7 | 2 - 0 - 5 | 380 | 420 | -40 | 9 |
| 7 Tjaldur | 7 | 1 - 0 - 6 | 365 | 475 | -110 | 3 |

### 1. Deild menn

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 6 | 4 - 2 - 0 | 518 | 446 | 72 | 19 |
| 2 VÍF | 7 | 4 - 0 - 3 | 586 | 499 | 87 | 17 |
| 3 Kyndil | 7 | 4 - 2 - 1 | 519 | 507 | 12 | 16 |
| 4 Neistin | 7 | 2 - 1 - 4 | 529 | 506 | 23 | 14 |
| 5 KÍF | 7 | 2 - 2 - 3 | 505 | 523 | -18 | 11 |
| 6 H71 | 7 | 4 - 0 - 3 | 486 | 545 | -59 | 11 |
| 7 Tjaldur | 7 | 0 - 1 - 6 | 471 | 588 | -117 | 4 |

## Máltindarnir

### Kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 154 | (38) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 141 | (40) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 137 | (38) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 132 | (41) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 130 | (64) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 126 | (18) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 123 | (42) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 111 | (21) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 103 | (28) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 98 | (6) |
| Alina Olaru | StÍF | 86 | (8) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 81 | (6) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 79 | (1) |
| Ileana Manolescu | Kyndil | 71 | (12) |
| Laila Jespersen | VB | 62 | |

### Menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 169 | (17) |
| Damir Oros | KÍF | 152 | (33) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 130 | (20) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 124 | (4) |
| Áki Olsen | VÍF | 119 | (9) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 111 | (7) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 108 | (24) |
| Áki Mørk | Neistin | 104 | (26) |
| Ingi Olsen | VÍF | 99 | (20) |
| Finnur Hansson | Kyndil | 88 | (13) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 88 | (22) |
| John Zachariasen | VÍF | 85 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 85 | (25) |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 76 | |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 71 | |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 19 | 16 - 3 | 52 | 22 | 30 | 24 |
| 2 Mjølnir | 19 | 15 - 4 | 51 | 18 | 33 | 23 |
| 3 TB | 19 | 13 - 6 | 47 | 21 | 26 | 18 |
| 4 Dráttur | 19 | 8 - 11 | 29 | 41 | -12 | 11 |
| 5 Fleyr | 19 | 3 - 16 | 14 | 50 | -36 | 5 |
| 6 KÍF | 19 | 2 - 17 | 11 | 52 | -41 | 3 |

### Meistaradeild, menn

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 15 | 13 - 2 | 41 | 9 | 32 | 18 |
| 2 SÍ | 16 | 9 - 7 | 30 | 24 | 6 | 15 |
| 3 Mjølnir | 15 | 9 - 6 | 30 | 23 | 7 | 13 |
| 4 Fram | 15 | 7 - 8 | 25 | 26 | -1 | 10 |
| 5 Fleyr | 15 | 0 - 15 | 1 | 45 | -44 | 0 |

Stjørnan-Tjaldur 25-14 (15-3):

# Einki at tosa um

**Stjørnan vant burtur úr Tjaldrinum í hálvan tíma, og tó at gestirnir fingu pyntað um í seinna hálvleiki, so er avgjørdi botnsessurin ein staðfesting, sum ikki slepst undan**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Har var eingin ivi um nakað sum helst, tá Stjørnan tók ímóti Tjaldri sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað skuldu ganga 32 minuttir, áðrenn Tjaldur fekk nakað mál burtur úr opnum spæli í KÍ-høllini sunnudagin. Bert trý mál høvdu gestirnir fingið fyrra umfarið av dystinum, og hesi vóru øll komin við brotskasti.

Tá heimaliðið um sama mundi hevði fingið ikki færr enn fimtan av slagnum, stóð ættiliga skjótt greitt, at her skuldi Stjørnan vinna væntaða sigurin, og tó at gestirnir fingu loyvi at pynta um úrslitið seinasta hálva tíman, so var ongan tíð nakar sum helst ivi um, hvønn veg stigini skuldu fara.

Við sigrinum vann Stjørnan seg aftur á triðja plássið á stigatalvuni, har tær í løtuni stríðast við Kyndil og StÍF, og enn er so einki avgjørt í tí stríðnum. Kanska er StÍF best fyri í so máta við tveimum heimadystum móti hinum báðum bronsubiðlunum, men eisini dysturin í Klaksvik millum Stjørnuna og Kyndil kann gerast heilt spennandi í so máta.

Einasta, sum nú tykist fullkomuliga avgjørt er, at Tjaldur endar á niðasta plássinum í deildini. Og sum støðan er í løtuni, so mugu tær bara vóna, at kappingin í aðru deild lagar seg soleiðis, at eingin uppflytari verður funnin. Hetta um Søljan ikki endar nóg ovarliga í deildini.

### Dysturin í tølum

**Stjørnan-Tjaldur 25—14 (15-3)**

Málskjúttar:

Stjørnan: Danijela Ercevic 8, Natasha Stamenkovic 8(1), Una Olsen 3, Súsanna Hansen 2, Joan M. Joensen 2, Bára S. Klakstein 1, Gunnvør Isaksen 1

Tjaldur: Lenka Ribaric 6(3), Mona Langgaard 4, Oddvá Fossdalsá 1, Turid Lamhauge 1, Sonja Gleðisheygg 1, Milica Ergic 1

Brotskøst: Stjørnan 4, Tjaldur 4

Útvísingar: Stjørnan 1, Tjaldur 3

Dómarar úr H71: Høgni Joensen & Jákup Símun Simonsen

# KÍ vann Klaksvíks-kappingina

**Sum vant dystaðust tey fýra bestu liðini frá farna árinum í Klaksvík undan kappingarársbyrjan, og hesa ferð gjørdist heimaliðið úr KÍ vinnari av kappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Klaksvíkskappingin er vorðin fastur táttur av fyrireikingunum til nýggja fótbóltsárið, og í ár gjørdust tað klaksvíkingar sjálvir, sum tóku sær av steypinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Seinastu tíggju árini ella so hevur Klaksvíks kappingin verið fastur táttur av upphitingini til komandi kappingarárið í fótbólti. Umframt KÍ, sum skipar fyri kappingini, er talan um tey liðini, sum í farna árinum stóðu seg best í lands- og steypakapping. Sostatt vóru tað í ár meistararnir úr HB, steypavinnararnir úr NSÍ og so GÍ, sum tóku dystin upp við KÍ, og burtur úr hesum komu so fýra hampuliga góðir venjingardystir, har liðini líka sum fingu roynt seg sjálvan.

### Ymsar umstøður

Leygardagin vórðu hálvfinalurnar í kappingini so leiktar í oysandi regni. Kanska ikki bestu umstøðurnar at hugna sær á vøllinum, men kortini ikki verri enn so, at dystirnir kundu leikast.

Í eysturoyaruppgerðini millum NSÍ og GÍ bendi alt tann vegin, at NSÍ skuldi koma í finaluna, eftir at gøtumaður fyrst hevði fingið reyða kortið, og NSÍ síðani hevði lagt seg á odda 2-1, men tá gøtumenn so javnaðu stutt undan dystarloki, varð neyðugt við brotssparkskapping, og hesa vann GÍ.

Í hinari hálvfinaluni tókust arvafíggindarnir, KÍ og HB, og har var skjótt, at KÍ var omaná. Longu eftir fyrsta hálva tíma stóð 3-0 til heimaliðið, og tó at HB royndi at stríða seg inn aftur í dystin, so vendist ikki.

Soleiðis kom finalan at standa millum KÍ og GÍ, sum í vakra várveðrinum sunnudagin fóru á vøllin. Her kom einki mál ígjøgnum teir 90 minuttirnar, so fyri aðru ferð í tveir dagar skuldu gøtumenn avgera ein dyst av brotssparksblettinum. Hesa ferð var eydnan tó ikki við teimum, og saman við áskoðarunum við Djúpimýru kundu KÍ-leikararnir soleiðis fegnast um fyrsta steypið á árinum.

Dysturin um triðja plássið stóð soleiðis millum HB og NSÍ, og hendan dystin vann HB 5-2.



SÍ-ÍF 1-3 (19-25, 20-25, 25-21, 20-25):

# ÍF fór heim við gullinum



*Fuglfirðingar eru nú eisini føroyameistarar. Tað gjørdist greitt, eftir at teir vunnu toddystin móti SÍ, sum var einasta liðið, ið kundi hótta*

*Mynd: Finnur Justinussen*

**Fuglfirðingar eru greipuvinnarar í mansflogbólti. Hetta varð staðfest í Sørvági, tá ÍF vann trupla útidystinum móti einasta liðnum, sum framvegis kundi hótta teir**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

So er leyst og liðugt hjá ÍF. Mansliðið úr Fuglafirði hevur alt árið á tamb verið oddalið í bestu flogbóltsdeildini, men hóast hesa støðu, so mundu fuglfirðingarnir ikki vera heilt álvuligir undan seinasta dystinum. Sørvingar hava havt støðuga framgongd gjøgnum kappingarárið, og tó ÍF framvegis hevði havt avgerðina í egnum hondum, hóast tap í Sørvági, so var einki at ivast í, at fuglfirðingar flest vildu sleppa undan einuma alt ella einki dysti í seinastu uppgerðini móti Fram, sum fleiri ferðir í ár hevur argað oddaliðið.

### Sannførandi

Undan dystinum var spenningurin stórur. Ikki minst á heimaliðnum, har SÍ eftir trý greið tap á rað bert var tríggjar bóltar frá at vinna steypafinaluna á ÍF. Og spurningurin var so, hvørt sørvingarnir fóru at verða tað lítla pettið stinnari á heimavølli.

Men tað vóru teir so ikki, ella kanska vóru tað fuglfirðingarnir, sum megnaðu at sveiggja seg tað lítla pettið eyka.

Tí tað var eingin, sum eftir dystin kundi seta ein fingur á avrikið hjá fuglfirðingunum. Serstakliga stóðu teir seg væl tey bæði fyrstu settini, har teir eftir stuttari løtu skræddu seg leysar av sørvingum, og síðani hildu fast um munin.

Hvørt tað vóru fuglfirðingarnir, sum nú vóru farnir at hugsa um skreyt og gull, ella um tað brádliga vóru teir á heimaliðnum, sum settu eyka ferð á, er ilt at siga, men triðja settið skapti aftur spenning í FM-stríðið. Sørvingar vóru omaná allan vegin, og tá farið varð undir fjórða settið, helt gongdin fram. Sørvíngar tóktust vera greitt omaná, tá ein meira ella minni endurtøka av finaluni tók seg upp. Júst sum alt tóktist liggja ræðið fyri hjá liðnum, steðgaði alt upp. Fugfirðingarnir hinvegin vóru ikki seini at taka av. Alt fyri eitt tóku teir seg inn aftur á heimaliðið, og so við øktu teir um munin, soleiðis at tað at enda stóð øllum greitt, at hetta vóru komandi meistararnir.

### Vóru teir bestu

Og meistarar eru teir. Fuglfirðingarnir. Við einum liði, sum ígjøgnum alt árið hevur staðið fram sum hitt sterkasta í landinum, og tó at tað eitt skifti hómaðist ein lítil niðurtúrur, so fekk hesin ongan tíð loyvi at breiða seg.

Kanska størsta kynstrið í kappingarítrótti er at avmarka vánaligu løturnar á vøllinum, og hetta hava fuglfirðingarnir eisini megna betri enn nakar annar. Eftir tvey tap á rað í endaspælinum, harav teir kundu takka sær sjálvum fyri annað, var annars brádliga vandi fyri, at bæði klaksvíkingar og sørvingar fóru at blanda seg, men tað var tó skjótt, at liðið fótaði sær aftur.

Ein lættur dystur móti Fleyr var tað, sum skuldi til, til tess at fáa sálarliug javnvágina heilt rætta aftur, og síðani hevur bara gingið ein veg. At mentaliteturin er hin rætti, kom eisini til sjóndar í finaludystinum í steypakappingini. Har vórðu teir varð raktir av skaða, beint sum sørvingarnir høvdu vunnið sær ein at síggja til avgerandi fyrimun, men kortini megnaðu teir at koppa øllum á.

Umframt henda vilja, hevur breiddin í spælinum helst eisini verið stóra styrkin hjá liðnum. Í veruleikanum hevur einki veikt punkt verið, og hevur onkur leikari havt ein ringan dag, hava aðrir altíð staðið klárir at taka yvir. Ivaleyst er tað eisini júst hetta, sum hevur verið størsta mangulvøran hjá mótstøðuni, har lutfalsliga stórur partur av ábyrgdini hevur verið á einstøkum leikarum.

Nei. Einki er at ivast í, at tað er fult og heilt uppiborið, at fuglfirðingar aftur kunnu rópa seg føroyameistarar.

TB-Mjølnir 1-3 (25-20, 15-25, 17-25, 16-25):

# Mjølnir gjørdi sítt

**Móti einum ómotiveraðum TB-liði helt Mjølnir fast í seinastu vónini um gullið**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Enn er meistaraheitið í kvinnuflogbólti ikki heilt avgjørt. Mjølnir fekk nevnliga stigini við sær, tá tær vitjaðu nú frákoyrdu meistararnar í Trongisvági, og soleiðis er enn ein møguleiki – um hann enn er teoretiskur – fyri, at oddasessurin kann skifta hendur í seinasta umfarinum.

Í Trongisvági hevði TB ikki annað enn æruna at spæla fyri, eftir at tær máttu lúta fyri ÍF seinasta vikuskiftið. Og hesin faktorurin vísti seg at vera ov lítið móti Mjølni, su spældi fyri sínum møguleika.

Tað var annars TB, sum kom betri frá byrjan, men tá Mjølnir veruliga setu trumf á, var tað sum um tímdi TB ikki meira. Tey trý næstu settini var tað Mjølnir, sum sat á øllum, og so var bara at bíða hjá teimum fyri at vita, hvussu leikur fór í Vágunum.

Har gjørdist tað sum kunnugt ÍF, sum dróg longra stráðið, og sum støðan er nú, skal einki minni enn eitt undur til, at fyri at gullið skal fara til Klaksvíkar.

Tað er í øllum førum illa hugandi, at ÍF fer at missa, tá tær í seinasta umfarinum eiga heimadyst móti KÍF, men møguleikin er har framvegis, og enn er bólturin rundur, tó at tey flestu munnu halda, at hann nú er um at gerast dekan ov avlangur.

KÍF-Fleyr 3-1 (25-17, 25-22, 15-25, 25-23):

# Til tað seinasta

**KÍF hevur enn ikki givið seg heilt, men skal sessurin í deildini varðveitast, krevst ein 3-0 sigur á ÍF í seinasta dystinum**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Við einum sigri sunnudagin kundu kvinnurnar hjá Fleyr beina allan iva av vegnum, men tað hendi ikki. KÍF var nevnliga stinnara liðið í botnuppgerðini, og við sigrinum longdu kollfirðingarnir í øllum førum tilveruna í deildini við einari viku.

Enn eru nevnliga tvey stig á muni, og sum um tað ikki er nóg mikið, hevur Fleyr eisini ein settmun, sum er fimm betri. Tað merkir við øðrum orðum, at skal KÍF halda sessinum, skulu tær vinna 3-0 á Kambsdali, samstundis sum Fleyr tapir sín dyst móti Mjølnir við 3-0, so har skal vilja meira enn vanliga væl til, um bjargingin skal koma. Men enn spæla tær úr KÍF so fyri møguleikanum.